














Nakrar hendingar í 1977...

## Sebastian einsamallur á pallinum

*Danski sangarin og listarmaðurin Sebastian, sum tá var 28 ára gamal, vitjaði í Føroyum um tað mundið, tá SMS fyri 25 árum síðani varð tikið í brúk. Hann hevði konsertir í Gøtu, á Tvøroyri og í læraraskúlahøllini á Frælsinum í Havnini, og hann var væl fagnaður*



Útlendsku tónleikavitjanirnar vóru ikki so tættar fyri einari fjórðingsøld síðani, sum tað kanska hava verið tey seinnu árini. Men tað kom meiri enn so fyri miðskeiðis í sjeyti árunum, at útlendskir sangarar og tónleikarar vóru í Føroyum.

Danski sangarin og listarmaðurin Sebastian, sum tá var 28 ára gamal, vitjaði í Føroyum um tað mundið, tá SMS fyri 25 árum síðani varð tikið í brúk. Hann hevði konsertir í Gøtu, á Tvøroyri og í læraraskúlahøllini á Frælsinum í Havnini, og hann var væl fagnaður. Tað var Studio 77, sum tað tá kallaðist, ið hevði fyrireikað konsertferðina.

Nakrar hendingar í 1977...



*Richard Long var 88 ára gamal, tá hann andaðist fyri 25 árum síðani*

## Richard Long andaðist

Stutt fyri jól í 1977 – tað var 16. desember – sløknaði ein av teimum, sum í stóran part av tí, sum var farið av tjúgundi øldini, hevði verið við til at seta dám á Føroyar og samfelagsmenningina á so ymiskum økjum. Richard Long var 88 ára gamal, tá hann andaðist fyri 25 árum síðani.

Lívsverkið hjá honum var á málsfrøðiliga økinum. Hann skrivaði, birti uppundir og var íblásari, og so var hann lærari á flestu skúlunum í høvuðsstaðnum, sum høvdu víðari útbúgvingar á skránni.

Richard Long var løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin og eisini landsstýrismaður. Í minningarorðum varð tikið til, at nógv at tí, sum hann skrivaði og var uppií – eitt nú var hann ritstjóri á Varðanum – fór at liva eftir henda merkismann, og tað hevur eftirtíðin prógvað at vera soleiðis.